ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands
Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**R-C003-1**

# Reglugerð um persónlyfting við krana

Sambært løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, §17, stk. 2, hevur Landsstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð.

## KAPITTUL 1.

### *Lýsing*.

**§ 1.** Sum høvuðsregla skal staðfestast, at krani bert er innrættaður til at lyfta góðs við. Tað er tó loyvt at lyfta persónar í góðkendari arbeiðskurv við krana, tá fylgjandi treytir eru loknar:

## KAPITTUL 2.

### *Arbeiði*.

**§ 2.** Persónlyfting má bert gerast av og á til lættari arbeiði, so sum skifting av ljósperum og -rørum, lættari uppsetingararbeiði, reingerðing, málaraarbeiði og líkn.

## KAPITTUL 3.

### *Kranin*.

**§ 3.** Lyftievni hjá krananum skal verða í minsta lagi 2.000 kg. Krani við flytandi útliggjara ella útliggjara við rennikøtti, skal í minsta lagi kunna lastast við 1.500 kg í tí støðu, har lyfting av persóni skal gerast.

**Stk. 2.** Samlaða vektin, ið lyft verður, t.v.s. arbeiðskurv við persónum, amboðum og tilfari, má ikki fara upp um ¼ av loyvda lyftievni hjá krananum og má ongantíð fara upp um 1.000 kg.

**Stk. 3.** Krani við flytbarum útliggjara, skal hava trygt virkandi endasteðg fyri rørsluni av útliggjaranum

***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **5. april 1994** | **7. maj 1998** |

Rennikøtturin má ikki kunna fara av sporinum ella kunna koyra út av endunum av skinnarunum,

og hann skal kunna haldast fastur í eini hvørji støðu.

**Stk. 4.** Kranin má ikki verða innrættaður til fría loring, og skal verða útgjørdur soleiðis, at ferðin í mesta lagi er 0,5 m/sek. at hiva og lora við.

**Stk. 5.** Ein høvuðsavbrótari skal verða soleiðis støðaður og innrættaður, at kranførarin frá sínum førarasessi kann steðga øllum kranarørslum.

**Stk. 6.** Um kranakrókurin undir persónflyting kemur nærri enn 6 m at toppskivuni, skal eitt trygt hæddarsteðg verða.

**Stk. 7.** Eitt persónlyft skal leggjast soleiðis tilrættis, at kranakrókurin ongantíð kemur nærri enn 2 m at toppskivuni.

## KAPITTUL 4.

### *Arbeiðskurv.*

**§ 4.** Gólvið skal verða glíðitrygt og tilgjørt úr plátutilfari (ikki timbur), ella t.d. úr tættmeskaðum stålneti (meskavídd hægst 15 mm).

**Stk. 2.** Arbeiðskurvin skal hava ein 10 cm høgan tættan fótlista á øllum síðum. Síðurnar av kurvini kunna verða gjørdar úr sama tilfari sum gólvið. Síðurnar á kurvini skulu verða í minsta lagi 1 m høgar og hond- og knælisti skal verða allan vegin runt. Fótlistin skal verða gul/svart strípustur uttan. Hondlistin skal verða 10 cm innanfyri og 10 cm omanfyri kantin á síðunum. Portrið í gyrðingini má ikki kunna opnast úteftir og skal hava sjálvvirkandi lás.

**Stk. 3.** Arbeiðskurvin skal berast av:
- einum tryggum og stívum rimaverki, sum ovast endar í einum eyga ella líkn. til festi fyri kranakrókin,
- ketum ella stroppum av stáli, ið eru forsvarliga fest í ovastu 4 hornini á kurvini. Ketur ella stroppar skulu samlast ovast á ein slíkan hátt, at eingin vinkul millum ketur ella stroppar er meira enn 90°.

**Stk. 4.** Hvør keta skal kunna bera ta samlaðu lastina við einum trygdartali uppá 6 í mun til ta váttaðu minstu brotlast fyri viðkomandi ketu. Tað mugu ikki brúkast ketur av tilfari, hvørs tvørmát er minni enn 6 mm.

**Stk. 5.** Hvør stroppur skal kunna bera ta samlaðu lastina við einum trygdartali uppá 10 í mun til ta váttaðu minstu brotlast fyri viðkomandi stropp. Tað mugu ikki brúkast stroppar við einum tvørmáti undir 8 mm. Ketur ella stroppar mugu ikki kunna takast av kurvini uttan at nýta amboð.

**Stk. 6.** Arbeiðskurvin má ikki, sjálvt í ringastu laststøðu, kunna hella meira enn 20°.

**Stk. 7.** Festið av arbeiðskurvini til kranakrókin skal verða tryggjað móti at kunna krøkja seg av.

**Stk. 8.** Arbeiðskurvin skal verða merkt við loyvdu last í kg.

## KAPITTUL 5.

*Nýtsla*.

**§ 5.** Persónlyfting við krana má bert gerast við góðkendari kurv.

**Stk. 2.** Kranaførarin skal hava kranføraraprógv - sí kunngerð nr. K-C003-1 frá 12. nov. 1979 um kranføraraprógv.

**Stk. 2.** Undir persónflyting má ferðin av kranakrókinum í allar ættir ikki fara upp um 0,5 m/sek.

**Stk. 3.** Áðrenn persónlyfting fer fram, skal øll útgerð og arbeiðsumstøður kannast av kranaføraranum og tí ella teimum sum skulu lyftast. Eftirlitið skal serliga umfata arbeiðskurvina, rimaverkið, festið til kranakrókin, kranarørslurnar og trygdarútgerðina á krananum.

**Stk. 4.** Tað mugu bert takast tey amboð og teir lutir við í kurvina, sum eru av slíkum skapi og hava eina slíka vekt, at ein persónur kann handfara tey.

**Stk. 5.** Um arbeiði við el-sveising skal gerast frá arbeiðskurv, skal tryggjast, at sveisistreymur ikki kann leiðast gjøgnum veirarnar á krananum.

**Stk. 6.** Kranin skal standa á burðartryggum undirlagi og persónlyfting úti má bert gerast í góðum veðurlíkindum.

**Stk. 7.** Verður persónlyfting gjørd á ferðsluøkjum, skal økið steingjast, soleiðis at forðað verður fyri, at kranin verður ákoyrdur og at óviðkomandi persónar koma inn á økið har kranin arbeiðir.

**Stk. 8.** Tað skal verða møguleiki fyri samrøðu millum í minsta lagi ein persón í kurvini og kranaførarin. Kunna teir ikki beinleiðis hoyra hvønn annan, skal annað samband fáast í lag, t.d. við telefon ella radio. Í minsta lagi ein persónur í kurvini skal kenna tey tekin, ið verða brúkt í kranaarbeiði.

## KAPITTUL 6.

*Sýn og eftirlit*.

**§ 6.** Nýggj kurv skal sýnast og roynast av Arbeiðseftirlitinum, áðrenn hon verður tikin í nýtslu. Lýkur hon galdandi treytir, verður hon skrásett og góðkend.

**Stk. 2.** Kurvin skal verða undir støðugum eftirliti og skal sýnast eina ferð í hvørjum álmanakkaári. Fyri nýtt og tíðarásett sýn og roynd, letur eigarin eitt gjald, ið er ásett av Landsstýrinum.

## KAPITTUL 7.

*Ung undir 17 ár*.

**§ 7.** Ung fólk undir 17 ár mugu ikki nýtast til arbeiði í kurv, tá arbeiðshæddin er meira enn 5 m yvir lendið.

## KAPITTUL 8.

***Gildi fyri reglugerðina*.**

**§ 8.** Hendan reglugerð kemur í gildi 1. mai 1994.

**Arbeiðseftirlitið**, 5. apríl 1994.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)